


# Ein harður vegur gjøgnum svartasta helviti við kós móti deyðanum – amen




**Øssur Johannesen hevur við nýggjastu útgávu síni gjørt eina fløgu, sum á ongan hátt er løtt at koma í gjøgnum, men sum samstundis er ein sterk listarlig uppliving**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*

Tónleikurin hjá Øssuri Johannesen er ikki lætt tilgongiligur, og nýggjasta útgávan hjá honum er einki undantak. Fløgan »Ein harður vegur gjøgnum svartasta helviti við kós móti deyðanum - amen«, er ein tung ferð at ferðast. Tað var stutt sagt rættiliga torført hjá mær at koma ígjøgnum útgávuna. Eg hevði ferð eftir ferð hug til at sløkkja fløguna, tí hon var so órógvandi og so larmandi á ein so pátreingjandi hátt. Hetta er galdandi í tónleikapettum, sum t.d. »Paranoidur í einum vandamiklum stað í myrkrinum«, har tann vanvittiga urgan er nærum ikki til at halda út at hoyra og í »Myrkir, villir, burturvilstir, hjartaknústir listamenn á ferð gjøgnum myrku náttina frá barr til barr til barr« og tittullagnum, »Ein harður vegur gjøgnum svartasta helviti við kós móti deyðanum - amen«, sum bæði við sínum svakliga dámi eru nærum ov strævin til at lurta eftir.

### Ársins heiti

»Ein harður vegur gjøgnum svartasta helviti við kós móti deyðanum - amen«, hetta heitið má vera ein kandidatur til besta føroyska fløguheitið nakrantíð. Uttan minsta farra av ironi, kann Øssur lýsa sínar tragisku lívsroyndir á henda hátt. Hetta er hart og kontant, og so er tað eisini so sera hóskandi til hesa fløgu, ið eisini á tónlistarliga økinum er myrk og órógvandi, og á tremur við tónleikapettum, ið hava nærum líka rámandi heiti.

### Fleiri ljóðføri

Øssur er, í øllum førum í føroyskum høpi, ein heilt serligur listamaður. Hansara improviserandi spæl er altíð inniligt, og altíð persónligt. Hetta var galdandi á solobass fløgunum, á fløgunum saman við Hjalta Joensen og eisini á seinastu fløguni hjá Øssuri, har hann hevði onnur ljóðføri enn bassin við. Á nýggju fløguni »Ein harður vegur gjøgnum svartasta helviti við kós móti deyðanum - amen« spælir Øssur gittar, bass, urgu og trummur. Hetta litar ljóðmyndina heldur øðrvísið enn vanligt hjá Øssuri, men enn er svart tann dominerandi liturin. Eisini tónleikastílurin er enn egin, eitt slag av Instru-Mental.

### Innspæld á myrkum stað

Eins og øllum teimum undanfarnu fløgunum gerast ljóðførini ljóðspor til tað, sum bylgist innan í Øssuri. Fløgan er spæld inn um sama mundið, sum Øssur var innlagdur á psykiatrisku deild. Vit hoyra tí ein listamann, ið er staddur á einum sera myrkum stað og tað hoyrist. Trummurnar, bassurin, gittarararnir og urgan ljóða órógvandi, og sinnissjúkan gjøgnumsúrgar ljóðmyndina. Hetta skapar eina heilt serstaka sterka ljóðuppliving. Tað tykist inniligt, erligt, men eisini rættiliga óbehagiligt í støðum.

Eg havi onga illusión um, at Øssur ætlar at gera tónleik, sum er behagiligur, og tað er eisini í lagi, men hetta setur krøv til lurtaran, og tað er ikki víst, at lurtarin hevur hug ella orku til at lúka hesi krøv, og tá er vandi fyri, at lurtarin velur upplivingina frá, og hetta er synd, tí »Ein harður vegur gjøgnum svartasta helviti við kós móti deyðanum - amen« er ein sterk listarlig uppliving.

### Fimm tímar at taka upp

Øssur hevur sjálvur komponerað, spælt og skipað allan tónleikin, og sambært fløguhúsanum tóku upptøkurnar einans fimm tímar í RMS Studio í Saltangará. Upptøkutøkningur, var Hjalti Joensen, ið áður hevur spælt fleiri fløgur inn saman við Øssuri. Tað er eisini Hjalti, ið hevur ljóðblandað. Eg haldi Hjalta vera komnan væl frá hesum, tó at tað er eitt sindur torført at meta um, tí her er talan um so serstakan tónleik, at tað er trupult at meta um, hvussu hann kundi ljóða.

### Styrkin í groovinum

Longsta lagið á fløguni »Sorg, einsemi og syrgiligur longsul«, er ein frægd at hoyra. Hetta lagið tykist eitt sindur friðsælari enn flest øll hini løgini á fløguni, og tann ofta sera desperata kenslan, ið nógv av hinum løgunum hava, er ikki dominerandi í hesum lagnum. Á eini ófrættakendari fløgu verður hetta á onkran hátt eitt vakurt friðskjól frá tí svaka.

Av bestu tónleikapettunum á fløguna, má eg nevna »Svakur fullamannadansur og ørskapur«. Hetta lagið hevur eitt undirliggjandi groove, ið virkar sum eitt slag av karmi, ið á onkran hátt ger ørskapin nóg skipaðan til, at tú eina løtu veruliga kann njóta tónlistarligu upplivingina. Tað er kanska júst hetta, at tónleikurin á onkran hátt er so óskipaður, ið ger Øssur til tað, hann er. Men tað kemst ikki uttanum, at eitt sindur av skipan ger upplivingina lættari at fyrihalda seg til, og ja, at njóta. Tað hevði ivaleyst klætt Øssuri, at improviseringarnar eitt sindur oftari høvdu okkurt slag av skipan at virka undir, verið tað seg eitt undirliggjandi groove ella, eg tori næstan ikki at skjóta tað upp, eitt lag. Men tað er samstundis alla æru vert, at Øssur heilt tilvitað velur tað vanliga frá.

### Heimagjørdur dámur

Húsin gongur væl hond í hond við tónleik og heiti. Húsin hevur tann heimagjørda dámin, ið húsar hjá Øssuri altíð hava. Serliga væl dámar mær, at hann brúkar handskrift til allan tekst á fløguni, tað er vorðið fastur táttur á fløgum hjá Øssuri, og gevur húsunum ein persónligan dám. Prentið á sjálvari fløguni er rind órógvandi og summi av løgunum, ein lágupployslig mynd av Øssuri við holi í pannuni. Ja, stutt sagt er fløgan væl gjøgnumførd, eisini á hesum partinum.

## FAKTA

**Øssur Johannesen**
Ein harður vegur gjøgnum svartasta helviti við kós móti deyðanum - amen
Útgevari: TUTL
Spælt, komponerað og skipað: Øssur Johannesen
Tikið upp: í RMS Studio
Upptøka og ljóðblanding: Hjalti Joensen
Húsi: Øssur Johannesen
Spælitíð: 50.57
Løg:
Sorg, einsemi og syrgiligur longsul
Paranoidur í einum vandamiklum stað í myrkrinum
Indiánarar og sigoynarar
Myrkir, villir, burturvilstir, hjartaknústir listamenn á ferð gjøgnum myrku náttina frá barr til barr til barr
Svakur fullmánadandur og ørskapur
Ein harður vegur ígjøgnum svartasta helviti við kós móti deyaðanum amen
Ljós og líðing